Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Tillagað størv

Spurningar:

1. Hvussu nógv fólk fingu tillagað starv í 2021 í mun til í 2020?
2. Hvussu nógv av teimum, sum fingu starv í 2021, fáa minni í løn, vegna tær broytingarnar, ið vórðu gjørdar í skipanini við løgtingslóg nr. 187 frá 18. desember 2020?
3. Hvat hevði tað kostað landskassanum eyka í 2021, um hesi fólk fingu løn samsvarandi tí, ið var galdandi áðrenn broytingina í løgtingslóg nr. 187 frá 18. desember 2020?
4. Metir landsstýrismaðurin, at skipanin við tillagaðum størvum, ið fevnir um fólk við breki og kroniskum sjúkum, var rætta staðið at spara?

Viðmerkingar:
Í 2020 samtykti Løgtingið við løgtingslóg nr. 187 frá 18. desember 2020 (lm nr. 031/2020) at broyta skipanina við tillagaðum størvum soleiðis, at tey, sum komu í skipanina eftir 1. januar 2021, fáa millum 2.100 krónur og 10.000 krónur minni í løn um mánaðin. Tey, ið fáa tillagað størv, hava mist rættin til sáttmálaásetta løn, og parturin frá tí almenna til lønina verður ein veiting og kann skifta frá ári til árs við løgtingslóg heldur enn, at øll lønin fylgir sáttmálanum hjá avvarðandi fakfelag.

Lógaruppskotið skapti mismun millum bólkar av fólki á tveimum punktum: Á einari síðu mistu tey nýggju, sum komu og fara at koma í skipanina eftir broytingina, rættin til somu løn sum starvsfelagar teirra. Er ein føddur við ella fær eitt brek ella kroniska sjúku, so ger tað í sær sjálvum nú, at ein er minni virðismettur enn eins starvsfelagar eru í mun til løn. Á hinari síðuni er nú eisini munur á teimum, sum eru í skipanini við tillagaðum størvum, alt eftir um tey av tilvild fingu tillagaða starvið áðrenn ella aftaná lógarbroytingina.

Broytingin merkti eisini, at um fólk í tillagaðum starvi skifta starv, so fáa tey løn samsvarandi nýggju skipanini. Tískil er tað ógvuliga ósannlíkt, at nakar teirra nakrantíð fer at skifta starv, um so var, at tey fingu møguleikan ella ynsktu tað.

At skerja inntøkuna hjá fólki í tillagaðum størvum so nógv kann á ongan hátt sigast at støðugt bøta um lívskorini hjá fólki, ið bera brek, eins og grein 28 í ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, leggur upp til. Somuleiðis gera bæði ST sáttmálin og

brekpolitikkur landsins greitt, at ein skal miða eftir at javnstilla fólk, ið bera brek, við onnur, og hendan lógarbroytingin kann sigast at ganga beint ímóti tí.
Hetta inntrivið í lívsgrundarlagið og rættindini hjá fólki, ið hava tillagað størv, bleiv samtykt við grundgevingini, at landskassin skuldi spara. Hetta hóast, at øll, sum vóru til hoyringar, mæltu frá at samtykkja broytingina.

Harafturat varð spurnartekin sett við, hvørt tað fer at loysa seg hjá fólki, ið bera brek ella hava kroniskar sjúkur, at nema sær útbúgving. Tá lønin ikki kann verða hægri enn tað sama, so kann tað taka áratíggju at vinna lønarmissin inn aftur, tá ein er undir útbúgving. Nógv í slíkum størvum kunnu enda í eini støðu, har tey fara á fyritíðarpensjón, og tí eru tað mong, ið ongantíð kunnu vinna lønarmissin inn aftur.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, um sparingin hevur verið so stór, at tað var tað vert at taka rættindi frá hesum bólkinum og gera liviumstøðurnar verri hjá teimum, ið eru nýggj í skipanini. Somuleiðis fær nýggi landsstýrismaðurin hervið møguleikan at bera fram, hvørt hann metir, at lógarbroytingin var røtt at fremja.

Á Løgtingi, 16. februar 2022

Ingilín D. Strøm